## Vápnasmugling avdúkað

Danska løgreglan hevur avdúkað eitt umfatandi vápnasmuglarakervi, sum hevur smuglað vápn ímillum fleiri lond í Evropa. Talan er um nútímans vápn og eldri vápn, sum smuglararnir hava sett í stand. TV2 segði í morgun, at løgreglan hevði lagt hald á 480 ymisk skotvápn, og at ee fólk eru tikin og sett í varðhald. Tey flestu eru tikin í Norður- og Eysturjyllandi, og teirra millum eru menn, sum hava verið í teirri sokallaðu heimaverjuni. Sambært TV2 kom løgreglan fram á smuglarakervið í fjør, og í desember byrjaði sjálvt avdúkingararbeiðið.

## Heldur livandi fisk

Norðmenn kanna nú, um tað ber til at goyma fisk livandi í ringum, tá prísurin er vánaligur, so hann kann takast og seljast, tá prísurin er batnaður aftur. Á tann hátt slepst undan ov stórum sveiggi í prísunum, og fiskurin verður meiri verdur. Kanningar, sum eru gjørdar fyrr, vístu, at virðið á toskakvotunum hækkaði meiri enn 35 prosent, um veiðan bleiv seld livandi, skrivar Aftenbladet. Nú hava myndugleikarnir gjørt av at skipa fyri einari granskingarverkætlan, sum skal kanna ymsar spurningar í sambandi við fóður- og veiðitøkni.

# Ein beiskur biti hjá løgmanni at svølgja

**Edmund Joensen er rættiliga óloyalur ímóti sínum egna formanni og orðalagið hjá honum má verða ringt hjá Kaj Leo Johannesen at svølgja**

SAMBANDS-FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta má vera ein beiskur biti hjá løgmanni at svølgja.

John William Joensen, formaður í Norðoya Sambandsfelag, er ikki fegin um framferðina hjá floksfelaginum, Edmundi Joensen, seinastu dagarnar.

### Skjóta eftir hvørjum øðrum

Sambandsflokkurin er komin í stríð við seg sjálvan um ríkisveitingina úr Danmark. Í farnu viku kom tingmanningin hjá Sambandsflokkinum til ta niðurstøðu, at samgongan eigur at bera so í bandi, at ríkisveitingin úr Danmark verður hækkað. Nakrar dagar seinni sendi Edmund Joensen, tingmaður og fólkatingsmaður út sokallað tíðindaskriv um tað sama sum um at hetta var nakað, hann sjálvur hevði funnið upp á.

Tað fekk Kaj Leo Johannesen, løgmann og formann Sambandsfloksins at tala at og hann helt, at tað átti at verið óneyðugt hjá einum einstakum tingmanni at sent tíðindaskriv út um nakað, sum øll tingmanningin var vorðin samd um nakrar dagar frammanundan.

Hann gjørdi eisini greitt, at hann fór ikki at seta samgonguni krøv, sum eru í stríð við samgongskjalið.

Edmund Joensen kvitteraði við einum heilt óvanligum nefsi til sín egna formann í lesarabrævi í mikukvøldið, har hann hvassorðaður kunngjørdi fyri Føroya fólki, at "tey, sum í næstum fara at kenna sviðan av sparingunum á fíggjarlógini, eiga at senda oddafiskunum í ABC-samgonguni ein tanka".

Sostatt ábyrgdaði hann eisini sín egna formann, Kaj Leo Johannesen, fyri skerjingar, sum hann staðfestir, at tað ikki slepst undan at gera í vælferðartænastunum næsta ár Samstundis á fólk, sum verða rakt av sparingunum um at senda Kaj Leo Johannesen ein tanka, tá ið skerjingarnar raka.

### Edmund farin ov langt

Og nú heldur formaðurin í Norðoya Sambandsfelag, at Edmund Joensen er farin út um mark.

Hann viðurkennur fult út rættin hjá einstøkum politikarum at siga sína hugsan.

Og hann heldur eisini, at tað er onki løgið, at orðaskiftið verður óvanligt í samfelagsliga spentum tíðum, sum hesum, vit nú eru í.

- Men orðavalið, sum hevur verið brúkt ímillum floksfelagar í Sambandsflokkinum seinastu dagarnar, hevur ikki verið heppið, sum hann málber seg.

John William Joensen heldur, at tað skal vera eitt mark og hann heldur, at hetta síðsta útspælið hjá Edmundi Joensen fór út um mark.



*Edmund Joensen er óloyalur og er farin út um mark, heldur John William Joensen, formaður í sambandsflokkinum í Norðoyggjum*

- So spurningurin um hann fær eitt nefs frá floksleiðsluni.

Hann staðfestir, at endamálið hjá leiðsluni er at halda einum livandi flokki saman.

- Men spurningurin er nær einstakir politikarar svinga seg framum leiðsluna og tað er ikki heppið.

Spurningurin er eisini, at hvussu savnandi floksformaðurin kann vera, tá ið hann verður niðurgjørdur á slíkan hátt, sigur John William Joensen.

Hann heldur nevniliga, at Edmund Joensen er rættiliga óloyalur.

- Orðalagið hjá Edmundi Joensen, má verða tungt hjá teimum at fáa út yvir seg, sum sita við samráðingarborðið og at fáa eitt úrslit burtur úr.

Hetta má vera ein beiskur biti hjá Kaj Leo Johannesen at svølgja og hetta má eisini verða tørført at góðtaka hjá restini av tingmanningini, sum stendur leiðsluni við lið, leggur hann afturat.

Hann fæst kortini ikki at siga beinleiðis, um hann heldur, at løgtingsmaðurin eigur at fáa eitt nefs frá floksleiðsluni.

Annars heldur hann, at Kaj Leo Johannesen hevur dugað rættiliga væl at takkla hesa støðuna og sjálvur er hann sera væl nøgdur við leiðsluna í flokkinum.

# Søpla 300 milliónir burtur

**Tíverri ber ikki til at tosa fornuft við Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkin**

RÍKISVEITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin eru til reiðar at søpla einar 250-300 milliónir í berari fáfongd.

Tað staðfestir Johan Petersen, formaður í Samhaldi, sum er lokalfelagið hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy.

Vit hava spurt hann, hvat hann heldur um støðuna í Sambandsflokkinum hesa seinastu vikuna í sambandi við orðaskiftið ríkisveitingina úr Danmark.

Hann vísir á, at Føroyar eru í undantaksstøðu, tí vælferðartænastur verða skerdar inn á bein.

- Sostatt eru vit í eini støðu, sum vit ikki sleppa undan at taka upp og tí er tað gott, at vit hava politikarar sum Edmund Joensen, Magna Laksáfoss og Alfred Olsen, sum reisa spurningin í samgonguni og vísa á, at í ríkisveitingini liggur ein inntøkumøguleiki, sum ikki verður troyttur.

Formaðurin í lokalfelaginum hjá Sambandinum í Eysturoy sigur, at tað er í hesum ljósinum, at rembingarnar seinastu dagarnar skulu síggjast.

Hinvegin heldur hann eisini, at formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, er í eini serligari støðu.

- Hann er eisini leiðari fyri alla samgonguna og tað má hann taka atlit til, sama hvussu tápuligir hinir samgonguflokkarnir eru og tað uppávuna megnar hann væl.

Hinvegin eru einstakir tinglimir í eini øðrvísi støðu, tí teir eru frælsari at føra síni egnu sjónarmið fram.

Kortini viðgongur hann, at hann hevði nokk lagt sær orðini øðrvísi, enn Edmund Joensen hevur gjørt.

### 250-300 milliónir um árið

Johan Petersen vísir á, at verður prístalsreguleringin av blokkinum tikin av, fer tað at føra til eina eyka inntøku upp á góðar 100 milliónir um árið.

Men vinningurin fyri búskapin verður nógv størri enn so.

- Verða góðar 100 milliónir settar í umfar í Føroyum, kasta tær 250-300 milliónir krónur av sær í skattum, avgjøldum og ymsum virksemi.

- Í veruleikanum er tað hendan upphæddin, sum Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava sagt frá sær í berari fáfongd.

Hann staðfestir samstundis, at tað er ikki brot á samgonguskalið at prístalsviðgerðin verður strikað.

Tað stendur í samgonguskjalinum, at ríkisveitingin skal minka 15% av veruliga búskaparvøkstrinum.

Men tað merkir so aftur, at tá ið búskaparvøksturin er negativur, skal minkingin í ríkisveitingin eisini vera negativ.

Ella sagt við øðrum orðum: Tá ið búskapurin minkar, eigur ríkisveitingin at veksa.

- Tí er tað als ikki brot á samgonguskjalið at tosa um at hækka ríkisveitingina í hesum tíðum. Tvørturímóti er tað brot á samgonguskjalið at lata vera.

Men støðan er tíverri tann, at tað er onki alternativ til ABC samgonguna og tí mestsum noyðist hon at halda fram.

Johan Petersen sigur, at avleiðingin av stívrendu støðuni hjá Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum verður, at fólk rýma av landinum.